# Quiz

**1** Borgarliga svenska stjørnin misti sín meiriluta á valinum sunnudagin. *Hvussu eitur svenski forsætisráðharrin?*

**2** *Hvussu eitur umstríddi flokkurin, sum hevur vunnið sær pláss í svenska Ríkisdegnum?*

**3** Føroya Banki hevur í vikuni sett nýggjan leiðara á Corporate Finance deildini. *Hvussu eitur nýggi leiðarin?*

**4** Dimmalætting hevur fingið nýggjan eigara. *Hvør hevur keypt Dimmu?*

**5** Stjórin í Kringvarpinum sigur, at KvF hevur ikki ráð at keypa rættindi til útidystir hjá føroyska fótbóltslandsliðnum. *Hvussu eitur stjórin?*

**6** Fólkaskúladeildin og Vinnu- og miðnámsskúladeildin í Mentamálaráðnum eru lagdar saman. *Hvussu eitur leiðarin fyri nýggju deildina?*

**7** Farna vikuskiftið vunnu KÍ kvinnurnar aftur føroyameistaraheitið í fótbólti. *Hvussu nógv FM hava KÍ kvinnurnar nú vunnið á rað?*

**8** Landsstýriskvinnan í almannamálum er støðugt í andgletti. *Hvussu eitur hon?*

**9** *Hvør liggur á odda í 1. deild hjá monnum í løtuni?*

**10** Maður í Havn hevur í vikuni boðið sær til at keypa húkin hjá klaksvíkingum. *Hvør er maðurin?*

**1-4** Ikki nóg gott
**5-7** Tú fylgir hampuliga væl við
**8-9** Tú fært tað mesta við
**10** Veist tú alt?

**SVAR**

*1. Frederik Reinfeldt, 2. Svøríkisdemokratarnir, 3. Joel undir Leitinum, 4. Eyðfinn Reyðberg, 5. Annika Mittún Jacobsen, 6. Olaus Jespersen, 7. 11 FM, 8. Rósa Samuelsen, 9. 07 Vestur, 10. Jógvan Weihe*

**10 TING** UM

# Frederik Reinfeldt

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



# Dámar húsligt arbeiði

SÍÐANI 2006 HEVUR HANN VERIÐ **FORSÆTISRÁÐHARRI** Í SVØRÍKI, MEN NÚ SKAL **FREDERIK REINFELDT** FINNA NÝGGJAN **MEIRILUTA**. REINFELDT SIGUR SEG DÁMA HÚSLIGT ARBEIÐI OG ER GIFTUR EINUM **POLITIKARA**

**1** Reinfeldt varð føddur í Østerhaninge 4. august 1965.

**2** Sum smádrongur búði hann eitt skifti í London, tí pápi hanara starvaðist har – sum ráðgevi hjá Shell.

**3** Mamma hansara var ráðgevi í leiðslu, og hon kann hava givið Frederik íblástur.

**4** Hann er giftur við Filippa, sum eisini er ein virkin politikari í Moderatarna.

**5** Tey eiga trý børn - Ebba, Gustaf og Erik.

**6** Longu sum 11 ára gamal varð Reinfeldt politiskt virkin. Tá gjørdist hann formaður fyri næmingaráðið á skúlanum hjá sær.

**7** Pápi hansara var eisini virkin í politikki, men gavst í fjør, eftir at hann var tikin fyri at koyra við kenning.

**8** Hann hevur útbúgving innan búskap frá lærda háskúlanum í Stockholm.

**9** Hann er íðin viðhaldsmaður hjá fótbóltsfelagnum Djurgården.

**10** Reinfeldt sigur seg dáma væl húsligt arbeiði.

## SITAT



Einasti munurin millum meg og ein svakan mann er, at eg eri ikki svakur

***Salvador Dali***
*spanskur listamaður*